# Orðklúgvarí um stjórnarskipan

**Fólkafloksfundur var í Miðlahúsinum týskvøldið, har lagt varð upp til kjak um føroyska grundlóg ella stjórnarskipan. Løgtingsmaður segði seg hava vón um politiska semju um grundlógararbeiðið, nú uppskot er lagt fyri Løgtingið um broyting í løgtingslóg um grundlógarnevnd**



*Eini 50 fólk vóru møtt á kjakfundinum í Miðlahúsinum, har evnið var grundlógin. Tað var Havnar Framburðsfelag við formanni Heðini D. Poulsen, sum skipaði fyri. Í panelinum sótu Kári á Rógvu, næstformaður í grundlógarnevndini, Súsanna Danielsen, stjóri á løgtingsskrivstovuni, Jóannes Hansen, fyrrverandi limur í grundlógarnevndini, og Poul Michelsen, tingmaður og limur í grundlógarnevndini. Halgir Winther Poulsen var orðstýrari*

*Mynd: Hans Kárason Mikkelsen*

LÓG & GRUNDLÓG & STJÓRNARSKIPAN

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Eitt panel varð mannað við millum annað fólki, sum á onkran hátt eru ella vóru knýtt at grundlógararbeiðinum.

Poul Michelsen, løgtingsmaður hjá Fólkaflokkinum, helt, at tað var umráðandi at fáa eina politiska semju um uppskotið til løgtingslóg um grundlógarnevndararbeiðið. Hetta uppskotið liggur í Løgtinginum í løtuni.

### Orðklúgvarí

Tað er greitt, at spurningurin um orð hevur verið týðandi í hesum málinum. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum vegna Føroya Landsstýri hevur lagt fram uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grundlógarnevnd, hevur lagt eitt uppskot fram, sum broytir ymsar orðingar. "Grundlógarnevnd" skal broytast til "Stjórnarskipanarnevnd" og "grundlóg" skal broytast til "stjórnarskipan," umframt aðrar broytingar.

Poul Michelsen heldur, at stríðið um orð kann forkoma einari møguligari politiskari semju um uppskotið.

- Ósemjan er bert orðklúgvarí. Mann má lyfta seg upp um hetta orðklúgvaríið og fáa eina semju í lag. Tað er tað, sum vit royna í løtuni, sigur Poul Michelsen, løgtingsmaður hjá Fólkaflokkinum.

Poul Michelsen sigur, at fyrr í vikuni sá ikki so bjart út, men at hann nú hevur betri vónir um at fáa eina semju um grundlógararbeiðið ella stjórnarskipanararbeiðið, sum skal halda áfram.

- Tað snýr seg um at fáa eina semju um tað arbeiðið, sum er gjørt higartil og halda áfram við tí arbeiðinum, soleiðis at arbeiðið kann gerast liðugt innan ein ávísan tíðarkarm, sigur Poul Michelsen.

### Grundlóg og fullveldissamgonga

Um broytingaruppskotið ikki verður samtykt á Føroya Løgtingi, so er tann gamla lógin um grundlógararbeiðið framvegis í gildi. Í broytingaruppskotinum stendur, at landsstýri heldur ikki, at nevndin á "nakran hátt skal vera bundin av sama leisti, sum grundlógarnevndin hevði." Tann leisturin er sum kunnugt fullveldisleisturin, sum táverandi samgonga hevði. Men í viðmerking í uppskotinum stendur eisini, at tað er náturligt, at nevndin nýtir arbeiðið hjá grundlógarnevndini sum grundarlag.

Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur og limur í grundlógarnevndini fram til 2002, segði á panelfundinum, at arbeiðið var rættiliga tengt at tí samgongu og tí ætlan, sum samgongan hevði aftaná 1998. Men, segði Jóannes Hansen, tað tóktist sum formansskapurin í nevndini rættiliga tíðliga royndi at leggja upp til eina tjóðskaparliga semju millum politisku flokkarnar. Tað er henda semjan, sum Poul Michelsen millum aðrar roynir at fáa í lag á Føroya Løgtingi, sum fríggjadagin skal viðgera uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grundlógarnevnd.

### Hví er álitið komið?

Kári á Rógvu, næstformaður í grundlógarnevndini, segði á panelfundinum, at roynt varð at finna ta tjóðskaparligu semjuna, men samstundis eisini at betra um stýrisskipanarlógina, sum er samtykt á Føroya Løgtingi.

Súsanna Danielsen, stjóri á løgtingsskrivstovuni, segði hinvegin, at meginparturin av okkara makt kemur frá heimastýrislógini, og hon segði seg ikki skilja, hví grundlógarálitið er komið. Við hesum vísti hon á álitið, sum varð lagt fram á flaggdegnum í fjør.

- Eg rokni ikki við, og vóni ikki, at hetta uppskotið verður samtykt, segði Súsanna Danielsen, vísandi til uppskotið, sum liggur í Løgtinginum, og sum skal til viðgerðar fríggjadagin.

## Hetta er partur av orkupolitikkinum

- Eg havi gjørt av, at Nólsoy verður tað økið, har vetni/vindverkætlanin verður realiserað, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við orkumálum.

- Hetta er ein partur av samlaða orkupolitikkinum hjá landsstýrinum, har vit skulu útnytta alternativar orkukeldur.

*Men hvør skal gjalda fyri verkætlanina í Nólsoy?*

- Tað verður ein kombinatión av almennum kapitali og privatum kapitali. Tað kann hugsast, at norðurlendskir midlar koma upp á tal eisini, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

Bjarni Djurholm sigur, at endaliga støða verður tikin í 2006, um verkætlanin skal realiserast fult út.

-hkm

# Vetni- og vindframleiðsla í Nólsoy

**Muligheder for fornybare energisystemer og hydrogenteknologi i Vestnorden er ein verkætlan, sum Nordisk Energiforskning stendur fyri, og sum hevur til endamáls at kanna møguleikarnar fyri í størri mun at nýta varandi orkukeldur í útjaðaranum av londunum í útnorði**

TÍÐINDASKRIV

*Oljufyrisitingin*

Orkunýtslan í hesum økjum stavar í høvuðsheitum frá termiskari orku. Við høga oljuprísinum gerst spurningurin um veitingartrygd sera átrokandi, og tí er alneyðugt at finna alternativ til dýru og dálkandi oljuna. Skilagóða loysnin er í størri mun at gagnnýta varandi orkukeldur - eisini út frá einum umhvørvissjónarmiði.

Arbeiðið við verkætlanin byrjaði í 2003, úrslitið av fyrsta skeiðinum er ein kortlegging av orkustøðuni í Føroyum, Grønlandi og Íslandi og ein metan av alternativum orkumøguleikum í umrøddu økjunum. Næsta skeiðið fevnir um savnan av hagtølum, m.a. vindhagtølum, í eitt ár. Ta skeiðið byrjaði við fundi í Oljufyrisitingini týsdagin. Síðan skal støða takast til um ein royndarverkætlan skal takast í nýtslu.

Niðurstøðurnar í frágreiðingini frá fyrsta skeiðinum lata myndugleikarnar í londunum, sum eru við í verkætlanini, gera av hvar ætlanin skal fremjast.

### Í Nólsoy

Landsstýrismaðurin í orkumálum hevur gjørt av, at vetni/vindverkætlanin skal liggja í Nólsoy.

Ætlanin er at seta eitt royndarverk upp sum kann gagnnýta vindorku til streymframleiðslu, sum partvís kann nýtast beinleiðis á el-kervinum og partvís til framleiðslu av vetni (hydrogen, brint) við einari prosess sum nevnist elektrolysa, har vatn verður skilt sundur í súrevni (oxygen, ilt) og vetni.

Framleidda vetni kann goymast í trýst tangum og nýtast seinni til el-framleiðslu við at brúka brennikyknur (fuelcells, brændselsceller), sum kann síggjast sum tann øvugta prosessin av elektrolysu, við tað at vetni og súrevni (úr luft ella reinum súrevni) renna saman og burturúr hesum fæst ravmagn (el), hiti og vatn. Samlaða virkningsgradin fyri eina sovorðna hydrogenskipan er umleið 30 %, hetta merkir at brennikyknan kann framleiða umleið 30% av streyminum, sum fer inn í elektrolysuskipanina frá vindmylluni. Um hitin verður gagnnýttur kann virkningsgradurin økjast munandi.